

# Plástur skal á tatoveringina

## Atlantic Airways

Flogterna er eitt av snotiligastu størvinum ein kann hava. Í øllum førum um ein hugsar um hvussu tær eru klæddar.

Annika Jespersen er kabinuovasti hjá Atlantic Airways og hevur ábyrgd av, at flogternurnar síggja soleiðis út, sum felagið vil.

– Vit hava uniformsreglar, sum vit mugu fylgja. Har stendur millum annað, at hárið skal vera stutt ella uppsett. Oyraringar skulu vera uppeftir oyranum, eftirsum ringar kunnu hanga fastir um neyðstøða verður, greiður Annika Jespersen frá.

### Reinan uniform

Hon hevur eitt sokallað »linecheck« við jøvnum millumbilum, har hon er við á eini flogferð og kannar, hvussu flogternurnar síggja út.

– Tá kanni eg, at uniformurin er reinur, og at alt sær út, sum tað skal.

Stílurin hjá flogternunum skal verða diskretur og klassiskur.

– Um tær hava sjónligar tatoveringar, skal plástur setast á, sigur Annika.

Orsøkin til, at allar flogternur eru so væl smurdar, sigur Annika, er vegna tað sterka ljósið í kabinuni, ið tekur allan lit úr andlitinum.



Flogternurnar skulu vera reinar og snotuligar.

# Vit mugu síggjast



Starvsfólkini í svimjihylinum eru klødd so at tey síggjast.

## Svimjihøllin í Gundadali

Í svimjihøllini fáa starvsfólkini útflýggjað klæði, ið eru serliga gjørd til svimjihøll.

– Vit eru øll í hvítari blus og reyðum buksum. Vit kunnu velja ímillum stuttar buksir ella tríkvart buksir, sigur Jón í Haraldstovu.

Um neyðugt er at leypa í hylin eru klæðini gjørd til endamálið og eru løtt at svimja í.

# Stjóranir eru fínast ílætnir

## Trygd og Eik

Í banka- og tryggingarheiminum er tað skjúrta og slips, sum eru vanligastu klæðini.

Hóast ongar reglar eru niðurskrivaðir, eru tað óskrivaðar reglur, ið stýra, og flestu stjórarnir eru í klædningi, og undursáttarnir eru í skjúrtu og slipsi ella einari fínari troyggju.

– Tað viktiga er at fokusera upp á, hvat kundin vil síggja, tá hann kemur inn til okkum, sigur Jean Djurhuus, stjóri á Trygd.

Tá sýningsmennirnir hjá Trygd eru úti og kanna skaðar, eru teir í jakkum, har tað sæst, hvaðani teir koma,

– Á skrivstovuni kann man ganga, sum man vil, men tey flestu mannfólkini eru í skjúrtu, og nakrir eru í klædningsjakka – harímillum eg sjálvur, sigur Jean Djurhuus, stjóri.

### Taka teg í allvara

Finn Damberg fíggjarstjóri á Eik hevur onki slips hendan dagin, vit tosa við hann.

– Tá eg veit, at eg ikki skal taka ímóti nøkrum gestum ella fara út til nakað, lati eg slipsi hanga heima, sigur hann.

Hann er nógv uttanlands í arbeiðsørindum, og tá er hann altíð í skjúrtu, slipsi og klædningi.

– Klæðini signalera, at fólk skal taka teg í álvara. Tað ber ikki til hjá mær at dukka upp í ketildrakt til ein viktigan fund, sigur hann.

Finn heldur ikki, at føroyingar standa aftan fyri útlendingar, tá tað kemur til klæði.

- Kanska brúka tey fleiri uniformar, tí fyritøkurnar eru størri uttanlands.



Tey sum starvast í banka eru fínt klødd, men stjórarnir eru fínast. Her eru tað fýra starvsfólk úr Eik í Havn.